# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 11.12.2024 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Niels Olaf Eyvindsson
Martin í Nesi
Eir J. Norðberg
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við, eitt alment og eitt ikki alment – játtað og koma á skrá sum mál nr. 8 og 9.

1. **<u>102-57-2024: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 213e/213b, Hvalba</u>.**

   Søkt verður um, at matr. nr. 213e letur umleið 25 m2 til matr. nr. 213b.

   **<u>Avgerð</u>:**

   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

2. **<u>102-55-2024: Vatnveiting í Sandvík - samanbinding</u>.**

   Økið í Sandvík, sum restar í, at vatnleiðing verður løgd, er umleið 340 m – mettur kostnaður fyri tilfar er kr. 34.500,00 u/MVG, haraftrat umleið 80 arbeiðstímar kr. 17.000,00.

   **Fíggjarnevndin 11.12.2024:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at fáa arbeiðið gjørt.

   **Tekniska nevnd 10.12.2024 og 22.05.2023:**

   Nevndin mælir til at taka av metingini uppá samanbinding av vatnveitingini og fáa hetta arbeiðið gjørt.

   **<u>Avgerð</u>:**

   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

3. **<u>102-56-2024: Skriv frá stýrinum fyri Lítlu Dímun</u>.**

   Vísandi til grein 10 í løgtingslóg nr. 66 frá 30. mai 2024 um burðardygga ferðavinnu, heitir stýrið fyri Lítlu Dímun á Hvalbiar Kommunu um at áseta reglur um, at tað bara skal vera loyvt at ferðast út í Lítlu Dímun saman við staðkendum fólki og at oyggin verður lýst sum serliga vandamikið øki.

**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt, samsvarandi §10 í løgtingslóg nr. 66 frá 30. mai 2024, at tað bara er loyvt at ferðast í Lítlu Dímun saman við staðkendum ferðaleiðara. Samtyktin fær gildi beinanveg og er galdandi, til onnur avgerð er tikin. Forboðið at ferðast í oynni uttan ferðaleiðara er galdandi alt árið.

4. **102-49-2024: Suðuroyartunnilin - hoyringsskriv.**
Hoyringsskriv viðvíkjandi uppskoti um Suðuroyartunnil, ið er sent til ummælis við freist til 12. des. 2024. Í hoyringsskrivinum verður m.a. dentur lagdur á, at Hvalbiar Kommuna fegin vil frætta nærri um, hvussu vegaloysnirnar í Sandvík og Hvalba ítøkiliga verða framdar, soleiðis at kommunan eisini kann viðvirka til, at góðar loysnir verða valdar, sóknini og fólkinum at frama.
**Tekniska nevnd 23.11.2024 og 10.12.2024:**
Nevndin mælir bygdarráðnum til at góðtaka hoyringsskrivið, sum tað fyriliggur nú.
**Vega- og havnanevndin 23.11.2024 og 10.12.2024:**
Nevndin mælir bygdarráðnum til at góðtaka hoyringsskrivið, sum tað fyriliggur nú.
**Fíggjarnevndin 11.12.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við fyriliggjandi hoyringsskrivi.
**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

5. **102-54-2024: Uppskot til kommunustýrisfundir 2025.**
Uppskot til kommunufundir 2025, har fundirnir eru mánadagar kl. 17.00.
**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at taka undir við uppskotinum til kommunustýrisfundir 2025.

6. **102-58-2024: Eykajáttan 2024 – 2. viðgerð.**
Samlaða umsóknin um eykajáttan 2024 kr. 10.585.000,00.
Samtykt á fundum 25.03.24, 24.06.24 og 21.10.24 at flyta millum løgur, íalt kr. 1.600.000,00.
Endaliga umsóknin um eykajáttan 2024 er sostatt kr. 8.985.000,00.
Eykajáttanin er fíggjað við tøkum peningi.
**Fíggjarnevndin 11.12.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við umsóknini um eykajáttan 2024.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt

7. **102-52-2024: Bátabrúgv í Nesi.**
Meting frá Tangavirkinum er kr. 40-50.000,00 + MVG fyri at gera eina rampu til bátabrúnna í Nesi. Á seinasta bygdarráðsfundi tann 27.11.2024 varð samtykt at beina málið aftur í nevnd og fáa arbeiðsformannin at kanna aðrar møguleikar. Mælt verður til at festa uttara enda á brúnni niður í botn, fyri at minka um, hvussu nógv brúgvin kann liva til síðurnar.

**Vega- og havnanevndin 10.12.2024:**
Nevndin mælir til at taka av hesum tilboði, sum tað fyriliggur.
**Fíggjarnevndin 11.12.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum/metingini frá Tangavirkinum og at fylgja tilmælinum hjá arbeiðsformanninum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og taka av tilboðnum frá Tangavirkinum og fáa arbeiðið gjørt.

8. **102-59-2024: Innkomin tilboð uppá nýggja maskinu frá KJ og O.K. Service.**
Takeuchi maskinan er frá 2016 og krevur ymiskt viðlíkahald. Arbeiðsformaðurin hevur innheintað tilboð uppá maskinur frá KJ og O.K. Service. Mett verður, at maskinan Takeuchi TB240 hóskar best til tørvin hjá kommununi.
KJ hevur tilboð uppá hesa – kr. 398.500,00, tá er gamla maskinan latin í býti og tilboð uppá at leasa kr. 6.730,00 um mánaðin í 60 mðr.
**Fíggjarnevndin 26.11.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av leasing-tilboðnum frá KJ uppá Takeuchi TB240.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

9. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.45

| | | |
|---|---|---|
| Janus Thomsen | Niels Olaf Eyvindsson | Martin í Nesi |
| Eir J. Norðberg | Thorstein Thomsen | Poul Laust Christiansen |